LÍVSVERK
EFTIRLØNARGRUNNUR LØNTAKARANNA

# Eftirlønargrunnur Løntakaranna
# (Lívsverk)

Skrás. nr. 3566

# Ársfrásøgn 2021

**Frumrit**

Góðkend á aðalfundi tann 31.03.2022

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit

| | Síða |
|---|---|
| Upplýsingar um grunnin | 2 |
| Frágreiðing til ársfrásøgnina fyri 2021 | 4 |
| Seinastu 5 árini | 9 |
| Leiðslustørv hjá nevnd og stjórn | 10 |
| Roknskaparátekning | 11 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 12 |
| Rakstrarroknskapur | 18 |
| Fíggjarstøða | 19 |
| Fíggjarstøða | 20 |
| Frágreiðing um eginogn | 21 |
| Notur | 22 |

# Upplýsingar um grunnin

## Grunnurin:

- Eftirlønargrunnur Løntakaranna
- Skrásetingar nr. 3566
- Stoffalág 17
- 100 Tórshavn
- Heimstaðarkommuna: Tórshavn

## Leiðslubygnaður

**Nevnd:**

- Georg F. Hansen, formaður
- Hans Jacob Joensen
- Sunrid Vang
- Jan Otto S. Holm
- Páll Nielsen

**Stjórn:**

- Elin Sørensen

**Grannskoðanarbólkur:**

- Georg F. Hansen, formaður
- Hans Jacob Joensen
- Sunrid Vang
- Jan Otto S. Holm
- Páll Nielsen

## Grannskoðan og aktuarur

Grannskoðan:

- P/F Januar
  løggilt grannskoðanarvirki

Aktuarur:

- Steen Ragn
  Ábyrgdarhavandi aktuarur

# Frágreiðing til Ársfrásøgnina fyri 2021

## Endamál grunsins

Endamál grunsins er at reka eftirlønarvirksemi. Endamálið við hesum virksemi er at veita limunum eftirløn, tá limirnir gevast at arbeiða vegna aldur.

## Samanlegging við Eftirlønargrunn Havnar Handverkarafelags

Við gildi frá 1.1.2021 eru eftirlønargrunnarnir hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Handverkarafelag lagdir saman. Tað er Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelag, sum er framhaldandi grunnur undir navninum, Eftirlønargrunnur Løntakaranna við hjánavninum Lívsverk.

Tølini fyri rakstraroknskapin fyri árið eru merkt av, at talan nú er um munandi økt virksemi í mun til seinasta roknskap.

Í 5-ára yvirlitinum eru samanløgd tøl fyri báðar grunnarnar eisini víst til samanberingar.

## Úrslitið fyri 2021

Eftir eitt sera gott 2020, byrjaði 2021 nakað trilvandi. Tó vendi gongdin skjótt, og longu tá mars mánaði var um at enda, høvdu allir limir (ymisku aldursbólkarnir í aldurstillagaðu íløgunum) vinning av íløguvirkseminum.

Koronafarsóttin, sum av álvara ávirkaði virðisbrævamarknaðirnar í 2020, herjaði framvegis um allan heim, tá 2021 byrjaði. Sum kunnugt endaði 2020 at geva nøktandi virðisbrævavinning. Tí byrjaði 2021 við stóru spurningunum, um tað mundi fara at eydnast at basa korona, um heimsbúskapurin kundi lata upp aftur, og ikki minst hvussu virðisbrøvini fóru at standa seg í 2021.

Búskaparliga virksemið vaks við ársbyrjan 2021 og legði lunnar undir, at partabrøvini kundu standa seg væl. Samstundis var søguliga stór fíggjarpolitisk og pengapolitisk stimbran sett í verk. Koppingarevni, ið sóðu dagsins ljós í 2020, vóru meira og meira útbreidd, so samanumtikið var útgangsstøðið fyri góðum partabrævaári í 2021 gott.

Sum árið leið vóru fleiri koppingarevni góðkend av myndugleikunum og fleiri lond fóru undir at lata búskapin, sum var latin aftur fyri at tálma korona, upp aftur. Úrslitið av hesum var, at virksemið í vinnugreinunum, sum vóru harðast raktar av koronafarsóttini, økist. Kortini settu smittutøl í stóran mun dagsskránna á virðisbrævamarknaðunum – í øllum førum í stutta tíðarbilinum – og tá ymisku sjúkufrábrigdini herumframt sóðu dagsins ljós, var stundum óstøðugleiki á fíggjarmarknaðunum.

Umframt ta stimbran, sum longu var latin búskapunum frá mið- og tjóðbankum báði megin Atlandshavið, kunngjørdi nýggja Biden-stjórnin í USA, at tey fóru at stimbra teirra búskap við heili 1,9 milliardum dollarum aftrat, og sum lutur í hesi hjálp fekk hvør amerikanari 1.400 dollarar í lumman til nýtslu. Hetta vóru góð tíðindi fyri serliga partabrævamarknaðirnar, tí slíkur hjálparpakki stimbrar privatnýtsluna og harvið allan búskapin.

Ógvusliga stimbranin sást aftur í, at inflatiónstølini í USA fyribils fóru at hækka, og tað órógvaði lánsbrævamarknaðin. Í fleiri tíðarbilum í fyrru hálvu av 2021, stóðu lánsbrøvini seg illa, tí eftir at risastóri hjálparpakkin hjá Biden-stjórnini varð kunngjørdur, hækkaðu lánsbrævarenturnar munandi. Meðan rentan á 10-ára danska statslánsbrævinum lá um -0,5% við ársbyrjan, var hendan hækkað í +0,2% í mai. Eftir hetta fann danska statsrentan eitt nýtt støði og sveiggjaði rundan um 0% restina av árinum.

Hóast inflatiónin hækkaði, so vóru boðini frá mið- og tjóðbankum um hetta mundið, at ein fyribils hækking í inflatiónini ikki fór at ávirka tann so sera stimbrandi pengapolitikkin hjá teimum. Millum annað av hesi orsøk vóru partabrøvini ikki darvaði av gongdini í inflatiónstølunum.

Lága rentustigið eggjaði eisini íleggjarum at keypa partabrøv, tí væntaða avkastið frá lánsbrøvunum var lítið lokkandi.

Orsakað av hækkandi rentustigi og tí kortini lága rentustiginum, stóðu donsku lánsbrøvini seg samanumtikið sera illa í 2021. Útlendsku lánsbrøvini høvdu eisini avbjóðingar, meðan partabrøvini stóðu seg sera væl. Tað er lutfalsliga sjáldan, at íløga í donsk lánsbrøv gevur hall, men 2021 gjørdist eitt av hesum heldur sjáldsomu árum.

31. desembur hevði íløgan við lága váðanum eitt hall á 1,6%, meðan íløgan við høga váðanum hevði ein vinning á 19,3%. Hóast vánaligu gongdina í íløguni við lágum váða, høvdu allir lima-aldursbólkar, hvørs samlaði vinningur er ein samanrenning av íløguni við lágum váða og íløguni við høgum váða, ein íløguvinning í 2021.

**Staðfest úrslit**

Nevndin hevur valt at knýta eginognina at íløgupuljuni við lágum váða, sum hevði hall uppá 1,6% fyri árið. Tískil hevur eginognin negativt fíggjaravkast fyri árið.

Staðfesta úrsliti hjá Lívsverk fyri árið og býtið av hesum kann útgreinast soleiðis:

| | 2021 | 2020 |
|---|---|---|
| | t.DKK | t.DKK |
| Fíggjaravkast | 90.835 | 39.719 |
| Umsiting o.a. postar | -4.938 | 7.020 |
| Avs. til umsiting av eftirlønum | 0 | -1.201 |
| **Úrslit áðrenn býti** | **85.898** | **45.538** |
| | | |
| Fíggjaravkast til limir | 91.277 | 38.847 |
| Umsitingargjald limir | -6.390 | -3.491 |
| Váðainntøkur/-útreiðslur | 16 | 0 |
| **Tilskrivað limum í alt** | **84.904** | **35.356** |
| Aðrar inntøkur/útreiðslur | 1.452 | 9.310 |
| Váðainntøkur/-útreiðslur | -16 | 0 |
| Fíggjaravlop til eginogn | -442 | 873 |
| **Tilskrivað eginognini í alt** | **994** | **10.183** |
| **Býtt úrslit** | **85.898** | **45.538** |

Samanumtikið verður úrslitið mett at vera nøktandi.

## Kapitalstyrki

Grunnurin er sterkur í mun til sínar tryggingarligu skyldur.

| | 31.12.2021 | 01.01.2021 |
|---|---|---|
| | t.DKK | t.DKK |
| Eginogn | 32.739 | 31.865 |
| Limakontur | 97.510 | 89.128 |
| **Kjarnufæfeingi** | **130.250** | **120.993** |
| **Grundarfæfeingi** | **130.250** | **120.993** |
| | | |
| Fæfeingiskrav | 30.282 | 28.600 |
| **Kapitalstyrki** | **99.968** | **92.393** |

Individuelli solvenstørvur grunsins er uppgjørdur til 30,3 mió.kr. pr. 31.12.2021, sum kann útgreinast soleiðis:

| | |
|---|---|
| Marknaðarváði | 28,6 |
| Operationellur váði | 1,7 |
| Váði tilsamans at dekka | 30,3 |

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum eftir leiðslunnar áskoðan hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

## Útlit fyri 2022

**Eftirlønarvirkskemi**

Roknað verður við, at inngjøldini halda áfram at hækka, og at útgjøldini somuleiðis koma at hækkað.

**Íløguvirksemi**

Virðisbrævamarknaðirnir hava í 2022 havt eina tað vánaligastu ársbyrjanina síðani fíggjarkreppuna í 2008. Eftir, at metingin í 2021 var, at ógvusliga hækkingin í inflatiónini í USA og Evropa bert var fyribils, meta fleiri nú, at høga inflatiónin kann gerast meira varandi.

Her við ársbyrjan 2022, er búskarparvøksturin, sum annars var á nøktandi høgum stigi meginpartin 2021, lækkaður nakað. Samstundis er fíggjarmarknaðurin nógv órógvaður av høgu inflatiónini og staðfestari broyting í pengapolitikkinum hjá miðbankunum í Evropa og USA.

Nýggja peningapolitiska støðan er síðani ársbyrjan innprísað í partabrævamarknaðin og rentumarknaðin við tí úrsliti, at partabrævamarknaðirnir í heimshøpi eru lækkaðir munandi síðani hesir náddu hæddina um ársskiftið og somuleiðis er rentan á 10-ára danska statslánsbrævinum hækkað lutfalsliga nógv. Ítøkiligt kann nevnast, at í skrivandi løtu) er danski partabrævamarknaðurin lækkaður um 18% síðani ársbyrjan meðan týski og amerikanski marknaðirnir lækkaður um 13%. 10-ára danska statslánsbrævarentan er í sama tíðarskeiði hækkað úr 0,07% í 0,43%.

Stríðið millum Russland og Ukreina eigur ein ávísan leiklut í lækkaðu partabrævamarknaðunum. Støðan hesum viðvíkjandi er sera fløkt og í skrivandi løtu er Russland í gongd við at gera innrás í Ukreina, frá fleiri hermótum. Orsakað av hesum eru partabrævamarknaðirnir lækkaðir enn meira og 10 ára danska lánsbrævarentan er lækkað 0,1%-stig innrásudagin, tí íleggjarar søkja móti tryggari íløgumótum. Støðan er fløkt og óviss í løtuni, og sera trupult er at meta um avleiðingarnar. Fer NATO uppí stríðið? Kann hugsast at Kina fer at stuðla Russlandi?

Í øllum førum kann væntast, at stríðið millum Russland og Ukreina kann føra óvissu við sær eina drúgva tíð aftrat.

Saman við øktari útbreiðslu av koppingarevnum, at stórur meiriluti í flestu londum nú hevur havt korona og at mótstøðuførið tí er stórt, er úrslitið, at fíggjarmarknaðirnir nú at kalla als ikki geva smittugongdini nakran ans longur.
Sum støðan er í løtuni er líkt til, at júst hendan óvissan, ið veruliga setti dám á í 2020 og 2021, ikki ávirkar marknaðirnar longur.

Fleiri av stóru leikarunum á fíggjarmarknaðunum hava mett, at búskaparvøksturin, sum í løtuni er lækkaður nakað, fer at hækka aftur um 3-6 mánaðir samstundis sum inflatiónin væntandi lækkar nakað móti ársenda. Saman við hesum verður eisini væntað, at amerikanski miðbankin fer at hækka leiðandi rentuna 6-7 ferðir í ár og at evropiski miðbankin helst fer at hækka 1-2 ferðir. Nú breið semja tykist verða um hetta, er fíggjarmarknaðurin klárur at taka ímóti rentuhækkingunum, tí hesar eru innprísaðar og vilja ikki loypa hvøkk á, tá tær verða staðfestar. At partabrævamarknaðurin er lækkaður lutfalsliga nógv er samanumtikið helst ein keypsmøguleiki. Tí eru útlit fyri, at partbrøvini hóast alt kunnu enda árið við einum vinningi, hóast hesin tó kann væntast at vera avmarkaður.

Her er tó vert at leggja aftrat, at óvissan um gongdina restina av árinum er økt munandi, nú Russland hevur gjørt innrás í Ukreina.

Hægru lánsbrævarenturnar eru í roynd og veru eisini jaligar. Fleiri av hesum eru nú hækkaðar so mikið, at tær nú liggja omanfyri 0%. At ein renta liggur niðanfyri 0% er eitt búskaparligt sjúkutekin. Hægru renturnar vilja eisini framyvir økja um rentuinntøkurnar hjá grunnum sum Lívsverk.

Árið byrjaði sum nevnt sera neiliga við ógvusligum lækkingum á partabrævamarknaðunum. Jalig er í øllum førum, at lækkingin er komin so tíðliga í árinum, soleiðis at stundir eru at vinna tað mista aftur.

Samanumtikið kann tí væntast, at íløgurnar við ávíkavist lágum váða og høgum váða fara at enda á hægri stigi enn her við ársbyrjan. Ein avmarkaður vinningur á aldurstillagaðu íløgunum hjá Lívsverki kann væntast, men hesin fer mest sannlíkt ikki at liggja á sama stigi sum í 2021.

# Seinastu 5 árini

Niðanfyri eru sett upp tøl úr rakstri og fíggjarstøðu fyri framhaldandi grunnin. Tá tølini verða samanborin eigur at verða havt í huga, at EFA og EHH løgdu saman 1.1.2021, og at tølini fyri árini fram til og við 2020 einans umfatar EFA, sum er framhaldandi grunnur.

Fyri at geva eina mynd av tølunum, sum tey høvdu sæð út, um grunnarnir høvdu verið samanlagdir øll árini í yvirlitinum, eru niðast somuleiðis sett upp samanløgd tøl úr rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu fyri báðar grunnarnar EFA og EHH. Í hesi uppseting eru tøl fyri 2017-2020 fyri báðar grunnarnar løgd saman fyri at lýsa fíggjarligu gongdina.

| **Høvuðstøl** - framhaldandi grunnur (t.DKK) | **2021** | **1.1.2021** | **2020** | **2019** | **2018** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | | |
| Eftirlønargjøld | 95.642 | | 52.544 | 49.061 | 43.645 | 43.123 |
| Útgoldnar veitingar | -31.105 | | -18.080 | -17.168 | -14.029 | -13.720 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 90.835 | | 39.719 | 66.183 | -18.907 | 21.512 |
| Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi | -6.390 | | -2.290 | -2.344 | -2.553 | -2.643 |
| Eftirlønartekniskt úrslit | -17 | | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Úrslit av rakstri | 994 | | 10.183 | 1.485 | -442 | 522 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | | |
| Avsetingar til eftirlønarskyldur tilsamans | 1.303.269 | 1.162.211 | 763.389 | 705.787 | 617.641 | 608.096 |
| Limakontur tilsamans | 97.510 | 89.128 | 68.137 | 64.027 | 57.926 | 58.874 |
| Eginogn tilsamans | 32.739 | 31.865 | 26.897 | 16.833 | 15.348 | 15.790 |
| Aktiv tilsamans | 1.434.353 | 1.285.622 | 858.423 | 786.714 | 691.007 | 682.759 |

| **Lyklatøl** / ***Financial ratios*** | **2021** | **2020** | **2019** | **2018** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|
| Avkast viðvíkjandi marknaðarrentuproduktum | 7,1% | 4,9% | 9,4% | -2,7% | 3,3% |
| Váði á avkasti viðvíkjandi marknaðarrentueftirlønum | 2,00 | 2,00 | 3,75 | 3,75 | - |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 265 kr. | 116 kr. | 120 kr. | 133 kr. | 143 kr. |
| Kostnaðir í prosent av avsetingum | 0,5% | 0,3% | 0,3% | 0,4% | 0,4% |
| Renting av eginogn eftir skatt | 3,1% | 46,6% | 9,2% | -2,8% | 3,4% |
| Solvensdekningur | 430,1% | 345,3% | 270,6% | 265,2% | 286,5% |

| **Høvuðstøl** - EFA + EHH (t.DKK) | **2021** | | **2020** | **2019** | **2018** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | | |
| Eftirlønargjøld | 95.642 | | 85.910 | 82.155 | 72.410 | 67.718 |
| Útgoldnar veitingar | -31.105 | | -28.369 | -25.094 | -20.380 | -18.900 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 90.835 | | 54.291 | 90.434 | -36.082 | 30.038 |
| Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi | -6.390 | | -4.943 | -4.467 | -4.401 | -4.519 |
| Eftirlønartekniskt úrslit | -17 | | -32 | -6.413 | -428 | -1.538 |
| Úrslit av rakstri | 994 | | 10.151 | -4.498 | -1.218 | -793 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | | |
| Avsetingar til eftirlønarskyldur tilsamans | 1.303.269 | 1.162.211 | 1.141.220 | 1.052.092 | 921.035 | 907.797 |
| Limakontur tilsamans | 97.510 | 89.128 | 110.118 | 102.505 | 86.034 | 86.509 |
| Eginogn tilsamans | 32.739 | 31.865 | 26.897 | 16.833 | 21.331 | 22.550 |
| Aktiv tilsamans | 1.434.353 | 1.285.622 | 1.285.621 | 1.178.671 | 1.037.333 | 1.025.320 |

# Leiðslustørv hjá nevnd og stjórn

Upplýsingar um onnur leiðslustørv hjá nevnd og stjórn sambært § 129 a í Kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum:

**Jan Otto S. Holm:**

Stjóri í:
- SP/F JOSH

Nevndarformaður í:
- P/F KJ Hydraulik

Nevndarlimur í:
- Landsbanka Føroya

LÍVSVERK
EFTIRLØNARGRUNNUR LØNTAKARANNA

# Roknskaparátekning

Vit leggja við hesum fram Ársfrásøgn fyri grunnin fyri 2021. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í tryggingarlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðuni og av úrslitinum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur eftir okkara áskoðan eina rættvísandi frágreiðing um gongdina í grunninum og um virksemi grunsins og fíggjarviðurskiftini, og eina lýsing av teim týdningarmestu váðunum og óvissu tættunum, sum kunnu koma at ávirka grunnin.

Tórshavn, tann 4. mars 2022

Stjórn:

Elin Sørensen, stjóri

Nevnd:

| | |
|---|---|
| Georg F. Hansen, form. | Hans Jacob Joensen |
| Sunrid Vang | Jan Otto S. Holm |
| Páll Nielsen | |

# Váttan frá óheftum grannskoðara

### Til eigararnar í Eftirlønargrunni Løntakaranna (Lívsverk)

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Eftirlønargrunni Løntakaranna fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2021 við fíggjarstøðu pr. tann 31. desember 2021, frágreiðing um eginogn, rakstrarroknskapi og notum fyri grunnin, íroknað frágreiðing um nýttan roknskaparhátt.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2021 og av úrslitinum av virksemi grunsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2021 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Okkara niðurstøða er í samsvari við grannskoðanarprotokollina til nevndina.

### Grundarlag undir niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardar um grannskoðan (ISA) og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin".

### Óheftni

Vit eru óheft av grunninum í samsvari við altjóða reglurnar hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA's Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið aðrar etiskar skyldur, sum ásettar eru í hesum krøvum í IESBA Code.

Eftir okkara bestu sannføring, hava vit ikki veitt nakrar ikki loyvdar veitingar, sum eru nevndar í grein 5 í Fyriskipan (EU) nr. 537/2014.

### Tilnevning

P/F Januar var fyrstu ferð valt til grannskoðara á aðalfundi tann 16.03.2013 fyri roknskaparárið 2013. Vit eru endurvald árliga við avgerð frá kapitaleigarunum óavbrotið fyri eitt tíðarskeið á tilsamans 9 ár íroknað roknskaparárið 2021.

**Megingrannskoðanarevni**

Megingrannskoðanarevni eru tey evni, sum eftir okkara fatan vóru mest týðandi í okkara grannskoðan av ársroknskapinum fyri 2021. Hesi evni vóru viðgjørd saman við okkara grannskoðan av ársroknskapinum sum heild, og tá vit gjørdu okkara niðurstøðu um tað, og gera vit tí onga serstaka niðurstøðu viðvíkjandi hesum evnum.

| ***Megingrannskoðanarevni*** | ***Okkara reaktión meðan vit hava grannskoðað*** |
|---|---|
| *Virðisáseting av fíggjarligum íløguognum* | |
| Grunnurin hevur íløguognir upp á tilsamans 1.432 mió. kr., sum er nærum 100% av fíggjarjavnanum tilsamans. Íløguognir umfata íløguognir tengdar at maknaðarrentuproduktum upp á 1.400 mió. kr.<br><br>Virðisásetingin á fíggjarlig amboð skrásett á keypsskála (støði 1) verður gjørd upp við støði í kursinum á keypsskálanum við endan á roknskapardegnum.<br><br>Vit hava lagt dent á virðisásetingina á fíggjarligum amboðum skrásett á keypsskála (íløguognir), av tí at tey eru týðandi í ársroknskapinum.<br><br>Víst verður til ársroknskapin brotið "Íløguognir" í umrøðuni av nýttum roknskaparhátti. | Vit hava mett um váðarnar við tí endamáli at fáa fatan av KT-skipanum, mannagongdum og innaneftirlitunum viðvíkjandi íløguognunum. Viðvíkjandi innaneftirlitunum mettu vit um, hvørt hesi vóru skipað og sett í verk á nøktandi hátt til at handfara váðan fyri týðandi feilum.<br><br>Vit eftirkannaðu fíggjarlig amboð (støði 1) í mun til kursin á keypsskálanum á við endan á roknskapardegnum.<br><br>Vit eftirkannaðu uppgerðina av dagsvirðinum av fíggjarligum amboðum við stakroyndum.<br><br>Vit mettu um, hvørt uppgerðin av fíggjarligum amboðum var nøktandi og fullfíggjað. |

| *Megingrannskoðanarevni* | *Okkara reaktión meðan vit hava grannskoðað* |
|---|---|
| *Virðisáseting av avsetingum til eftirlønir*<br><br>Grunnurin hevur sett av 1.303 mió. kr. til eftirlønir, sum er 91% av fíggjarjavnanum tilsamans.<br><br>Eftirlønaravsetingar eru einans grundaðar á marknaðarrentu og verða tí uppgjørdar til dagsvirði samsvarandi virði á teimum ognum, sum eru knýttar at eftirlønunum.<br><br>EFtirlønaravsetingar hava metingaróvissur viðvíkjandi metingum av livitíð. Virðisásetingin av eftirlønaravsetingum verður tó bara grundað á marknaðarrentuproduktir og verða tær tí virðisásettar til dagsvirði samsvarandi virði á teimum ognum, sum eru knýttar at eftirlønunum.<br><br>Virðisásetingin av ognunum, sum eru knýttar at eftirlønum, er ikki ávirkað av subjektiviteti og tí ikki tengt at metingaróvissu.<br><br>Vit hava lagt dent á virðisásetingina av avsetingum til eftirlønir, av tí at hesar eru týðandi í ársroknskapinum, og í ávísan mun ávirkaðar av roknskaparligum metingum, subjektiviteti og tí í ávísan mun tengdar at metingaróvissum.<br><br>Víst verður til ársroknskapin, "Avsetingar til eftirlønir til marknaðarrentu" í notu 9 og brotini í "Nýttur roknskaparháttur" "Íløguognir" og "Eftirlønaravsetingar". | Vit hava gjørt váðametingararbeiði við tí endamáli at fáa fatan av KT-skipanum, mannagongdum og eftirlitunum viðvíkjandi avsetingum til eftirlønir. Viðvíkjandi innaneftirlitunum mettu vit um, hvørt hesi vóru skipað og sett í verk á nøktandi hátt til at handfara váðan fyri týðandi feilum.<br><br>Vit hava brúkt okkara egnu serfrøði í metingini av aktuarhættum og myndlum, sum felagið hevur brúkt, og eisini viðvíkjandi brúktu fortreytunum og útrokningunum, sum eru gjørdar.<br><br>Vit mettu um og eftirkannað arbeiðshættir og myndlar eins og tær týdningarmestu fyritreytirnar, sum eru brúktar, grundað á okkara royndir og kunnleika til vinnugreinirnar, við tí fyri eyga at tryggja, at tær eru í samsvari við reglur og roknskaparkrøv. Hetta fevndi um eina meting av kontinuitetinum í grundarlagnum fyri útrokningini av avsetingum til eftirlønir.<br><br>Vit eftirkannaðu útrokningarnar av avsetingum til eftirlønir<br><br>Vit mettu um, hvørt tað sum er við í avsetingum til eftirlønir var nøktandi. |

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við føroysku tryggingarlóggávuna. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til fyri, at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissu er vissa við høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum er galdandi í Danmark og í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini, har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðar fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.
- Taka støðu til, um tað er rímiligt, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.
- Taka støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær grannskoðað verður og eisini um týðandi avdúkingar, herundir um týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Vit hava eisini veitt teimum, ið varða av leiðsluni eina váttan um, at vit hava liva upp til viðkomandi etisku krøvini um óheftni, og kunnu tey um øll sambond og onnur viðurskifti, ið rímiliga kunnu hugsast at ávirka okkara óheftni og, har viðkomandi, hvat er gjørt fyri at taka burtur hóttanir, ella verndartiltøk, ið sett eru í verk.

Ímillum tey evni, ið vit hava kunnað tey ið varða av leiðslu um, meta vit um hvørji evni eru mest týðandi í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum fyri inniverandi tíðarskeið, og tí verða mett sum megingrannskoðanarevni. Vit lýsa hesi evni í okkara grannskoðanarátekning uttan so, at lóg ella reglur forða fyri almannakunnger, ella tá, undir sera sjáldsamum umstøðum, vit meta at hesi evni skulu ikki vera lýst í okkara átekning, orsakað av, at tær óhepnu fylgjur tað kann hava viga tyngri enn áhugin hjá almenninginum í at fáa hesar upplýsingar.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga niðurstøðu við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum, er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina, og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa, um kravdu upplýsingarnar eftir føroysku tryggingarlóggávuni eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd eftir ásetingunum í føroysku tryggingarlóggávuni. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivar upplýsingar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 4. mars 2022

**P/F JANUAR**
løggilt grannskoðanarvirki

Heini Thomsen
statsaut. revisor

# Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2021 t.DKK | 2020 t.DKK |
|---|---|---|---|
| 2 | **Eftirlønargjøld** | **95.642** | **52.544** |
| 3 | Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 12.407 | 14.777 |
| 4 | Virðisjavningar | 79.922 | 26.424 |
| | Rentuútreiðslur | -445 | -597 |
| | Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi | -1.049 | -885 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **90.835** | **39.719** |
| 5 | **Útgoldin eftirløn** | **-31.105** | **-18.080** |
| | Broyting í limakontum | -8.382 | -4.110 |
| | Broyting í eftirlønaravsetingum | -141.059 | -57.602 |
| | **Broyting í eftirlønaravsetingum netto** | **-149.442** | **-61.711** |
| 6 | Fyrisitingarkostnaðir | -6.390 | -2.290 |
| | **Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi í alt** | **-6.390** | **-2.290** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | 442 | -873 |
| | **EFTIRLØNARTEKNISKT ÚRSLIT** | **-17** | **9.310** |
| 7 | Aðrar inntøkur | 1.452 | 0 |
| | Aðrar útreiðslur | 0 | 0 |
| | Íløguúrslit av eginognini | -442 | 873 |
| | **ÚRSLIT AV RAKSTRI** | **994** | **10.183** |

# Fíggjarstøða

| Nota | | 31.12.2021 t.DKK | 01.01.2021 t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| | Lánsbrøv | 435.386 | 639.432 |
| | Íløguprógv | 955.972 | 459.395 |
| | Partabrøv | 9.648 | 137.917 |
| | Útlán | 1.500 | 1.500 |
| | Innlán | 29.968 | 45.017 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir tilsamans** | **1.432.474** | **1.283.261** |
| | **ÍLØGUOGN ÍALT, TENGD AT EGINOGNINI** | **32.739** | **31.865** |
| | **ÍLØGUOGN TENGD AT MARKNAÐARRENTUPRODUKTUM Í ALT** | **1.399.735** | **1.251.396** |
| | Onnur áogn | 0 | 0 |
| | **ÁOGN TILSAMANS** | **0** | **0** |
| | Rentur til góðar | 1.878 | 2.361 |
| | **TÍÐARAVMARKINGAR Í ALT** | **1.878** | **2.361** |
| | **OGN Í ALT** | **1.434.353** | **1.285.622** |

# Fíggjarstøða

| Nota | | 31.12.2021 t.DKK | 01.01.2021 t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **SKYLDUR** | | |
| | Innskot | 13.421 | 13.421 |
| | Framflutt úrslit | 19.319 | 18.444 |
| | **EGINOGN Í ALT** | **32.739** | **31.865** |
| 8 | Innskot frá limunum (limakontur) | 97.510 | 89.128 |
| | **ÁBYRGDARLÁN Í ALT** | **97.510** | **89.128** |
| 9 | Avsetingar til eftirlønir til marknaðarrentu | 1.303.269 | 1.162.211 |
| | **AVSETINGAR TIL EFTIRLØNIR Í ALT** | **1.303.269** | **1.162.211** |
| | Skyld til atknýtt virkir | 0 | 1.022 |
| | Onnur skuld (stuttfreistað) | 834 | 1.397 |
| | **SKULD Í ALT** | **834** | **2.419** |
| | **SKYLDUR Í ALT** | **1.434.353** | **1.285.622** |

10 Trygdir og eventualskyldur
11 Útgreining av fíggjarognum og avkasti
12 Váðastýring og viðkvæmisupplýsingar
13 Nærstandandi partar

# Frágreiðing um eginogn

| | 31.12.2021<br>t.DKK | 01.01.2021<br>t.DKK |
|---|---|---|
| **Eginogn** | | |
| Innskot við ársbyrjan | 13.421 | 13.421 |
| **Innskot við ársenda** | **13.421** | **13.421** |
| | | |
| Flutt úrslit við ársbyrjan | 18.325 | 18.444 |
| Rætting til ársbyrjan | 0 | -119 |
| | 18.325 | 18.325 |
| Flutt frá rakstri | 994 | 0 |
| **Flutt úrslit við ársenda** | **19.319** | **18.325** |
| | | |
| **Eginogn við ársenda** | **32.739** | **31.746** |
| | | |
| **Grundarfæfeingi og fæfeingiskrav** | | |
| Eginogn | 32.739 | 31.746 |
| Limakontur | 97.510 | 89.128 |
| **Kjarnufæfeingi** | **130.250** | **120.874** |
| | | |
| Grundarfæfeingi | 130.250 | 120.874 |
| Fæfeingiskrav | 30.282 | 28.600 |
| **Grundarfæfeingi til avlops** | **99.968** | **92.274** |